MENTAMÁLARÁÐIÐ
INNANHÝSIS

Dagfesting: **7. mai 2013**
Tygara ref.:
Máltal: 12/00789-33

**Uppskot
til
kunngerð um átekning og stuðul til mentanarsøgulig skip**

Við heimild í § 3, stk. 1 og § 7 í løgtingslóg um mentanarsøgulig skip verður ásett:

## Átekning

**§ 1.** Skip, sum hevur mentanarsøguligan týdning, kann fáa átekning sum mentanarsøguligt skip eftir umsókn.
*Stk. 2.* Skrivlig umsókn um átekning verður send Søvnum Landsins, sum er antikvariski myndugleikin.
*Stk. 3.* Fyri at fáa átekning sum mentanarsøguligt skip krevst, at ánari søkir og skrivliga váttar at skipið kann verða varðveitt sum varandi mentanarminni, og at varðveitandi átøk, viðlíkahald og møgulig umvælingararbeiði verða gjørd eftir antikvariskum grundreglum, sum varða um søguligu dygdirnar hjá skipinum.

**§ 2.** Umsókn skal fevna um støðulýsing og dokumentatión um skipið, lýsing av søguliga týdninginum hjá skipinum og hvussu ektað og eftirfarandi tað er varðveitt.
*Stk. 2.* Søvn Landsins ráðgeva um tey í stk. 1 nevndu krøv til umsóknina.

**§ 3.** Metir landsantikvarurin, at skipið kann fáa átekning sum mentanarsøguligt skip, verður verndarætlan, ið landsantikvarurin fyriskipar, gjørd fyri skipið.
*Stk. 2.* Verndarætlanin lýsir, hvussu ætlanin er at varðveita skipið sum mentanarminni. Ætlanin greinar ítøkiliga, hvussu varðveitingararbeiðið skal fara fram, og hvussu varðveitandi átøk, viðlíkahald og møgulig umvælingararbeiði verða gjørd, harundir tíðarætlan og kostnaðarmeting.
*Stk. 3.* Meðan umsókn um átekning er til viðgerðar, mugu broytingar á skipinum bert verða gjørdar eftir avtalu við landsantikvarin.
*Stk. 4.* Tá landsantikvarurin hevur góðkent eina verndarætlan, fær skipið átekning sum mentanarsøguligt skip. Átekningin tilskilar, hvat antikvariska verndin fevnir um, sbr. § 1, stk. 2.

**§ 4.** Átekning skal verða endurskoðað av antikvariska myndugleikanum 7. hvørt ár.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • +298 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

*Stk. 2.* Átekning, sum er givin áðrenn løgtingslóg um mentanarsøgulig skip varð sett í gildi, er galdandi í 7 ár frá tí degi, ið skipið fyrstu ferð søkir um stuðul.

**§ 5.** Átekningin sum mentanarsøguligt skip verður fráboðað Skipaeftirlitinum og lýst alment.

**§ 6.** Koma ásetingar frá Skipaeftirlitinum í andsøgn við leiðreglurnar hjá antikvariska myndugleikanum, so skulu hesar ikki fremjast uttan við samtykki frá Søvnum Landsins.

**§ 7.** Verður skipið selt, skulu Søvn Landsins hava fráboðan um hetta.
*Stk. 2.* Skal átekningin sum mentanarsøguligt skip varðveitast, skal nýggj váttan, sbrt. § 1, stk. 3 latast Søvnum Landsins.

**Stuðul**

**§ 8.** Landsstýrismaðurin ger, eftir tilmæli frá Søvnum Landsins, av, hvussu árligi stuðulin verður býttur millum útreiðslur í sambandi við átekningar, umvælingarstuðul og rakstrarstuðul.

**§ 9.** Stuðulssøkjandi skip skal senda Søvnum Landsins útgreinaða lýsing av umvælingar-verkætlanini við tíðarætlan og fíggjarætlan til góðkenningar.
*Stk. 2.* Stuðulin til umvæling er í mesta lagi 60 % av útreiðslunum, sbr. § 10.
*Stk. 3.* Stuðulin til rakstur er í mesta lagi 40 % av útreiðslunum, sum sambært seinast grannskoðaða roknskapi varð nýttur til árligt viðlíkahald og annað, sbr. § 11.

*Umvælingarstuðul*

**§ 10.** Skip, sum hevur átekning sum mentanarsøguligt skip, kann søkja um stuðul til umvælingarverkætlan, harundir:

1) skrokkumvælingar, kalfatring, útskifting av plankum, kjøli, barlast, bondum, knøum, róðri og líknandi
2) dekk, stúttur, karmar, kappar, lúkur, lúnning, garnering og dekshús
3) at afturføra dokumenteraða innrætting, hús og stýrhús, salong, messu og maskinrúm
4) mastur, rundholt, riggning, besløg og segl
5) høvuðsmotorur / ljósmotorur, endurnýggjan av varðveitingarverdum/originalum motori og skrúvu.

*Stk. 2.* Stuðul kann ikki veitast til umvælingarverkætlan, sum hevur við sær nútímansgerð av upprunaligari ella varðveittari innrætting.

*Rakstrarstuðul*

**§ 11.** Skip, sum hevur átekning sum varðveitingarvert skip, kann søkja um stuðul til árligt viðlíka hald og annað, t.e. rakstrarkostnað fyri at halda skipið siglandi, harundir:

1) uppháling (botnviðgerð, aksultrekk, máling, zink o.a.)
2) reingerð og máling omandekks
3) motorrúm (eykalutir, olja, filtur, feitt, reingerð og máling)

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

4) aksultrekk
5) sýn av kravdari trygdarútgerð (t.d. bjargingarbátar, medisinkista, vestar, neyðbluss og rakettir)
6) eftirlit av radioútgerð, alarmum, oljufýring og øðrum
7) olja og landstreymur við bryggju um veturin
8) tryggingargjøld (skrokktrygging, hjálparfólkatrygging)
9) grannskoðan og bókhald.

*Útgjald*

**§ 12.** Stuðulin verður goldin út sambært ásetingunum í § 15, stk. 1 í roknskaparkunngerðini.
*Stk. 2.* Søvn Landsins lata TAKS upplýsingar um útgoldnan stuðul.
*Stk. 3.* Søvn Landsins kann almannakunngera, hvør ið hevur fingið stuðul og hvussu nógv.

*Treytir*

**§ 13.** Stuðulsmóttakari skal lata inn roknskap, tá verkætlanin er endað ella í seinasta lagi 1. mars árið eftir játtanarárið. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn um stuðul.
*Stk. 2.* Er stuðulsupphæddin 50.000 kr. ella meira, skal roknskapurin sum meginregla vera grannskoðaður. Søvn Landsins kann tó altíð krevja ein roknskap grannskoðaðan.
*Stk. 3.* Stuðulsumsøkjari skal upplýsa um øll viðurskifti, sum kunnu elva til, at stuðulsgrundarlagið verður lækkað.
*Stk. 4.* Søvn Landsins kann krevja stuðulsgrundarlagið nágreiniligari lýst og krevja innlit í skjøl hesum viðvíkjandi.
*Stk. 5.* Útgoldin stuðul, ið ikki er nýttur til endamálið, kann krevjast aftur.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • 🖂 mmr@mmr.fo • www.mmr.fo